*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*post@sosialurin.fo*



# aðurin styrkjast

tveimum bookarum á stórum spælistøðum í Belgia og seks tíðindafólkum frá m.a einum blaði, sum er á støði við Gaffa, einari útvarpsstøð sum P3 og einari netsíðu á støði við soundvenue.co.uk, sum eitur soundslike.bay, sigur Christian.

- Á marknaðum sum t.d í Onglandi og Amerika og á gigantiskum tiltøkum sum t.d Popcom, Midem og Eurosonic er yvirflóð av bæði tónleikarum og vinnufólki. Tað er øgiliga nógv vøra, sum verður bjóðað fram har, og í mun til vøruna eru tað lutvíst fáir keyparar. Tí satsa vit uppá Belgia júst nú. Landið er minni, men hevur alíkavæl ein aktivan marknaða. Tað er ikki fult av ráðvøru, og har er lættari at koma fram í løtuni, at blíva sæddur.

- Her kanst tú uppbyggja tær eitt netverk og ein kapital burturúr fløgusølu og framførslum, sum gevur tær resursir til at leypa víðari til tey stóru londini og tiltøkini. Tað nyttar einki beinanvegin at oysa fleiri milliónir í eitt tiltak í t.d London, um bara tríggir persónar leggja merki til tað. Hesir persónarnir fáa 20 onnur tilboð hvønn tann einasta dag. Møguleikin fyri at koma ígjøgnum har er ógvuliga minimalur, t.d í mun til á Benelux marknaðinum.

### Innflutningur eitt lyklaorð

- Ein annar fyrimunur við Belgia er mongdin av vøru, ið verður innflutt. Í londum sum Danmark og Onglandi keypir fólkið uml 50/50 prosent av útlendskari vøru og av egnari vøru. Belgia importerar nógv meira enn tað. Har keypir fólkið heili 85 prosent av útlendskari vøru og 15 prosent av egnari. Eftirspurningurin eftir útlendskum er tískil nógv størri, sum avgjørt er ein fyrimunur, tá m.a føroyskur tónleikur skal flytast inn í landið.

### Ávirkan við ágóða

Uml 40 av teimum røttu fólkunum (musikjournalistar, plátufeløg, bookarar, promotarar og management) úr teimum sjey londunum, sum Christian samstarvar við, verða boðin til Atlantic Soundscape. Umframt hesi 40 fólkini, tónleikararnar og fyriskipararnar sjálvar, verða uml 200 atgongumerki seld. Alt í alt fara umleið 300 fólk at hoyra Orca, Budam, Gestir og Boys in a Band framføra tann 3. mai í Brussel.

- Hetta fer heilt sikkurt at hava positiva ávirkan á Føroyar sum heild, tí tað kemur fokus á land og mentan. Enntá ferðavinnan kann styrkjast munandi. Hetta er ein góð byrjan, sum er lutvíst løtt og bílig og kann hava kollosalar bivirkningar á tónleikamenningina fyri Føroyar framyvir. Men hetta er nú eisini bara byrjanin. Gongur alt sum ætlað, fara vit við hesum at kunna byggja ein kapital upp, sum gevur okkum møguleika at at taka kampin upp við stóru londini seinni.

- Vit eru longu á góðari leið, og innan stutta tíð fara vita at hava eina seriøsa tónleikavinnu í Føroyum. Hendan vinnan fer at kunna arbeiða miðvíst við at reka tónlistarligu góðskuna, ið kemur frá landinum til ágóða fyri bæði landið sjálvt og viðkomandi tónlistarfólk.

## Komandi fløgur




**Dave Gahan**

**Heiti:** Hourglass - Remixes
**Útgávudagur:** 11 mars
**Plátufelag:** Mute Records

**Stutt um:** Í oktober í fjør gav Depeche Mode røddin, Dave Gahan, sína aðru solofløgu, »Hourglass«, út. Men fjepparar nýtast ikki at bíða leingi til hansara triðju útgávu, tí longu um góðar tvær vikur kemur eitt savn av remiksum av »Hourglass« út. Savnið verður útgivið sum vinyl við einari ókeypis fløgu afturat. Remiksing av løgunum er gjørd av m.a Digitalism, Booka Shade, Sebastian Leger og Kap10Kurt. Harumframt eru trý bonusløg, ið bara koma út við fløguni.
Á heimasíðuni davegahanofficial.com stendur, at remiks-savnið bara kemur út í USA ígjøgnum ThinkIndie.com, men tað er vert at fylgja við á amazon.com og iTunes, um hon skuldi komið til sølu har eisini.

**Web:** myspace.com/davegahanofficial



**Mínus**

**Heiti:** Great Northern Whalekill
**Útgávudagur:** 3. mars
**Plátufelag:** Smekkleysa/One Little Indian

**Stutt um:** Fjórða studiofløgan hjá íslendska hardcore rokkbólkinum Mínus kemur út aftaná vikuskiftið. Bólkurin hevur longu fingið ógvuliga positiv ummæli í fleiri tíðarritum, og vónirnar annars fyri komandi fløguni eru høgar.
Fløgan sigst at vera enn eitt meistaraverk afturat hinum trimum útgávunum hjá Mínus. Við »Great Northern Whalekill« sigst bólkurin eisini prógvað, at hann er nógv meira enn bara larmur; at sangskriving eisini kann gerast væl og gjøgnumført men tó lurtaravinarligt við hørðum rokki.
Fyrsta staklagið hjá Mínus av »Great Northern Whalekill« eitur Throwaway Angel og kann hoyrast á myspace profilinum hjá bólkinum.

**Web:** myspace.com/minus



**Simian Mobile Disco**

**Heiti:** Clock EP
**Útgávudagur:** 3. mars
**Plátufelag:** Wichita Recordings

**Stutt um:** Elektroduoin, ið fyrst bara æt Simian við electro-punki á dagsskránni, fekk í 2005 sítt fulla heiti, Simian Mobile Disco, og rætta ráða, psykadeliska elektroljóðið við løgum sum »Hustler«, »It's the Beat«, og »Tits and Acid«. Øll útgivin á debut fløguni hjá bólkinum »Attack Decay Sustain Release«, ið kom út í fjør. Nógvar aðrar útgávur eru komnar frá bólkinum í líkinum av EP, stakfløgu, miks-savnum osfr. Um stutta tíð kemur so nýggja EP'in, »Clock« út, ið inniheldur fýra spildurnýggj løg. Løgini eru øll instrumental og vera at fáa til keyps á iTunes eftir útgávudagin.

**Web:** myspace.com/simianmobiledisco




**Nick Cave and the Bad Seeds**

**Heiti:** Dig, Lazarus, Dig!!!
**Útgávudagur:** 3. mars
**Plátufelag:** Mute Records/Emi Music

**Stutt um:** So er hon her næstan; fjúrtanda studioútgávan hjá Nick Cave and the Bad Seeds. Nick Cave var seinast úti við uml eitt ára gomlu kjallararokk verkætlanini Grinderman, men hevur nú tikið sær tíð at lata seg aftur í klæðningin, trimma sær skeggið og koyra stílin við ringa fræðinum á útgávuni Dig, Lazarus, Dig!!! Staklagið við sama heiti vísir heilt klárt, at talan er um Cave-rokk, sum mann kennir hann, og leggur upp til eina útgávu, ið uttan iva verður tráðspæld í mongum fløguspælarum nakrar mánaðar framyvir. Hvussu restin av tónleikinum rundanum staklagið so veruliga verður, vil tíðin bert vísa. Tað er í øllum førum spennandi, sjálvandi, tá tað er Nick Cave.
Keyp fløguna á iTunes

**Web:** myspace.com/nickcaveandthebadseeds




**Van Morrison**

**Heiti:** Keep it Simple
**Útgávudagur:** 11. mars
**Plátufelag:** Lost Highway Records

**Stutt um:** Fyrsta nýggja tilfarið frá Van Morrison síðani 2005 kemur nú út á hillarnar um góðar tvær vikur. Útgávan verður ein varierandi samanseting av tonleikastílum, ið hann hevur spælt við gjøgnum síðstu fimm áratíggjuni. Í mun til stóru kompositiónirnar, ið plaga at seta dám á útgávurnar hjá Van Morrison, er hendan einfaldari við vøkrum, kenslubornum løgum, útsett við gittara, harmoniku og tekstum á singer/songwriter støði. Útgávan er søgd at vera ein tann mest beinrakna staðfestingin, Van Morrison hevur givið frá sær, har hann tekur saman um alla sína karrieru og púra erliga leggur kortini á borðið.
Keyp fløguna á recordstore.co.uk

**Web:** vanmorrison.com



**Simon and Garfunkel**

**Heiti:** Live 1969
**Útgávudagur:** 11. mars
**Plátufelag:** Columbia/Legacy Records

**Stutt um:** Í november 1969 vóru Paul Simon og Art Garfunkel á síni seinastu konsertferð, áðrenn ósemja stakk seg upp, og duoin syndraðist. Hendan síðsta konsertferðin skuldi gevast út á fløgu longu tá sum ein uppfylgjari av síðstu studiofløguni hjá teimum, »Bridge Over Troubled Water«, sum kom út í 1970. Men verkætlanin varð ongantíð fullfíggjað fyrr enn nú, 37 ár seinni. Fløgan inniheldur live útgávur av løgum frá »Bridge«, umframt aðrar klassikarar sum »Homeward Bound«, »The Boxer«, »Mrs. Robinson« og »The Sound of Silence«. Fløgan verður fyrst útgivin ígjøgnum kaffiketuna Starbucks men kemur síðani á vanligu fløguhillarnar innan stutta tíð. Gev gætur, at fløguhúsin ikki er almennur enn, og tí er pressumynd av Simon og Garfunkel brúkt her ístaðin.
Keyp fløguna á amazon.com